## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av eystri, seinnapartin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og lítið ella einki avfall. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Ætla at leita eftir »Hans Hedtoft«

**Nú verður roynt at savna pening til eina kavaraferð, sum skal royna at finna grønlandsskipið »Hans Hedtoft«, sum gekk burtur í januar í 1959**

SKIPSVANLUKKA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

»Hans Hedtoft« hevði júst verið í Grønlandi á síni fyrstu ferð, tá tað gekk burtur sunnan fyri Hvarvið. Øll tey 95 fólkini, sum við vóru, sjólótust. Teirra millum var sandvíkingurin Richard Jacobsen, sum var annar stýrimaður. Nú 51 ár aftan á vanlukkuna ætlar eitt kavaralið at leita eftir vrakinum.

Vanlukkan við »Hans Hedtoft« er ein av teimum mest umrøddu vanlukkunum í nýggjari danskari skipasøgu, og fleiri spurningar verða knýttir at henni. Fjarritarin á skipinum boðaði frá, at skipið hevði siglt á eitt ísfjall, men hesum ivast fleiri í. Tey hava hug at halda, at ein sveising í skrokkinum skrædnaði. Harafturat veit eingin við vissu, hvar vrakið liggur.

Nú ætla kavarin Thomas de Richelieu og fyrrverandi navigatørurin Claude Enoch at gera eina roynd at svara hesum spurningunum.

– Eg haldi ikki, at skipið rendi á eitt íafjall. Eg haldi, at tað var ein sveising, sum skrædnaði við maskinrúmið, sigur Thomas de Richelieu við Politiken. Hann og Claude Enoch vilja vera við, at »Hans Hedtoft« var ikki egnað til at sigla í ódnarveðri í Norðuratlantshavinum. Tað var heilt einfalt ikki nóg sterkt, siga teir.

Hinvegin ásanna teir, at enn hava vit bara boðini frá fjarritaranum um eitt ísfjall at halda okkum til. Men teir vænta, at myndir av vrakinum høvdu víst eina aðra orsøk.



*Sigldi »Hans Hedtoft« á eitt ísfjall, ella skrædnaði ein sveising í skrokkinum*

*Mynd: Polfoto*

### Savna pening

Thomas de Richelieu og Claude Enoch hava í fleiri ár roynt at savna pening til ta ætlaðu kanningarferðina. Tá var ætlanin at savna sjey milliónir krónur, sum skuldu fíggja sjálva leitingina og myndatøkuna. Men hóast eitt nú grønlendska landsstýrið segði seg styðja ætlanina, eydnaðist tað ikki at savna tann neyðuga peningin.

– Vit fingu nógvar jaligar viðmerkingar, men ongar pengar, sigur Thomas de Richelieu við Politiken. Men hann ætlar sær ikki at sleppa ætlanini.

– Fleiri hava spurt meg, hví eg ikki sleppi ætlanini. Men eg kann ikki, tí hetta er ov stórt. Hjá mær er hetta ein dreymur, og sjálvt um eg sleppi ætlanini, sleppi eg ikki av við dreymin. Og so er tað neyvan nakar annar, sum fer at royna, sigur hann.

Tí eru teir nú farnir undir at savna pening til ætlanina. Hesaferð hava teir tó avalt at býta verkætlanina í tvey. Í fyrra umfari ætla teir at finna vrakið og at tryggja sær, at tað er vrakið av »Hans Hedtoft«. Hesin parturin av verkætlanini er mettur at kosta tvær milliónir krónur, og fáa teir tann peningin, fara teir at leita eftir vrakinum.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | |
| Aberdeen | 4 |
| London | 5 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -5 |
| Stokkhólm | -3 |
| Keypmannah. | -3 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | -15 |
| Berlin | -11 |
| Warzawa | -13 |
| Kiev | -16 |
| Bukarest | -13 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 32 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani fer spakuliga í landnyrðing.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum sunnan fyri Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í februar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í februar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 30. januar | Mánin næstur jørðini/ Fullmáni |
| 5. februar | Seinna kvarter |
| 13. februar | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. feb | 09:45 | 22:09 | 08:45 | 21:09 | 09:00 | 21:24 | 11:45 | - | 00:21 | 12:45 | 08:00 | 20:24 | 07:00 | 19:24 | 10:00 | 22:24 | 11:00 | 23:24 | 09:30 | 21:54 | 10:45 | 23:09 |
| 4. feb | 10:34 | 23:12 | 09:34 | 22:12 | 09:49 | 22:27 | 00:09 | 12:34 | 01:09 | 13:34 | 08:49 | 21:27 | 07:49 | 20:27 | 10:49 | 23:27 | 11:49 | - | 10:19 | 22:57 | 11:34 | - |
| 5. feb | 11:50 | - | 10:50 | 23:15 | 11:05 | 23:30 | 01:12 | 13:50 | 02:12 | 14:50 | 10:05 | 22:30 | 09:05 | 21:30 | - | 12:05 | 00:27 | 13:05 | 11:35 | - | 00:12 | 12:50 |
| 6. feb | 00:15 | 13:08 | - | 12:08 | - | 12:23 | 02:15 | 15:08 | 03:15 | 16:08 | 11:23 | 23:48 | 10:23 | 22:48 | 00:30 | 13:23 | 01:30 | 14:23 | 00:00 | 12:53 | 01:15 | 14:08 |
| 7. feb | 01:33 | 13:58 | 00:33 | 12:58 | 00:48 | 13:13 | 03:33 | 15:58 | 04:33 | 16:58 | - | 12:13 | 11:13 | 23:38 | 01:48 | 14:13 | 02:48 | 15:13 | 01:18 | 13:43 | 02:33 | 14:58 |